Brúktan bil?

Vel tann, tú vilt hava



-20% í næstu viku

Frá mánadegi til fríggjadag í næstu viku kanst tú gera kvetti hjá Meinhardt Arge. Tú fært heili 20% í avsláttri av brúktum bilum. Eingin bilur verður tikin í býti. Tú finnur heilt víst tann rætta bilin til tín. Vælkomin niðan undir Krákugjógv.

P/F Meinhardt Arge

undir Krákugjógv 5, Tórshavn, Tel 34 54 00, Fax 34 54 01



# Ginusøgur tiknar av skránni

**– men bara á Meiarín-um. Nú verður farið at ferðast við leikinum.**

**Tað er ikki sensurur, ið ger at Ginu Søgurnar nú fara at gevast á Meiarínum, heldur ikki vánalig undirtøka. Tvørturímóti, leikurin hjá Eve Ensler hevur gingið fyri stúvstappaðum húsum, so at siga síðan byrjanina 5. oktober.**



TÍÐINASKRIV

Fyrsti leikurin hjá Grímu hetta leikárið hevur verið spældur 12 ferðir, fyri tilsamans yvir 1.100 fólkum, og hann hevur fingið stak góða móttøku, bæði í bløðunum og millum áskoðararnar annars.

Og hóast røddir, millum annað á tingsins røðarapalli, hava verið frammi um, at slíkt skuldi ikki verið loyvt á føroyskum leikpalli, so sær ikki út til at áskoðarafjøldin minkar. Hon tvørturímóti bara veksur. Fleiri fólk, ið ikki eru von, ella kanska ongantíð hava verið til sjónleik, hava takka fyri "eitt stórt upplivilsi" aftaná.

Men næsti leikurin í ár, LIST, skal framat á pallinum 2. november, og tí verða Ginusøgurnar niðurlagdar fyri fyrst. Ætlanin er so, at restin av landinum skal fáa gleði av teimum trimum "Ginunum", Biritu Mohr, Kristinu Hansen og Gunnvá Zachariassen. Hvussu leikferðin verður, hvar og nær, verður lýst í næstum.

Seinastu sýningarnar á Meiarínum verða í komandi viku. Atgongumerkið fáast á Kunningarstovuni, tlf. 31 57 88 og á Meiarínum, ein tíma undan sýning um ikki útselt er áðrenn.

*Løgtingsfíggjalógin 2003*

Almennur fundur verður á Muntra í Fuglafirði týskvøldið 22. oktober kl. 19.30
Búskaparfrøðingurin Magni Laksáfoss, fíggjarnevndarlimurnir Vilhelm Johannesen, Johan Dahl og Jóannes Eidesgaard umrøða evnið:

***Vánalig búskaparstýring og blokkniðurskurður merkja løgtingsfíggjarlógina***

Aftaná verður orðaskifti

***Eysturoyar Javnaðarfelag og Samhald***







Tann nýggi Hyundai Accent.
Meira familjubil fyri minni pening

3 ár/100.000 km verksmiðjuváttan og 6 ára rustgjøgnumteringsváttan.

Prísur úr einans kr: 117.750,- (3 hurðar)
og 128.750,- (5 hurðar)

Hyundai Accent er tað skilagóða valið til allar aldursbólkar. Her fært tú hágóðsku til skilagóðar prísir. Hyundai Accent er sterkur á øllum økjum. Rúmliga kabinu, økonomiskan motor við góðari orku, allar hentleikar. Tryggleikin er settur í hásæti við m.ø. 4 airbags. Aircondition er standard- útgerð í øllum Hyundai Accent bilum. Modellini eru: 1.3 l. og 1.5 l. Bæði við 3 ella 5 hurðum.

HONDA NORÐBIL SKODA Volkswagen Group HYUNDAI

Box 1070 · Oyggjarvegur · FO-110 Tórshavn · Føroyar · Tlf. 31 37 07 · Fax 31 08 55




3 VINIR GSM

Ring upp í 25% biligari til tíni trý yndisnummur

1. nummar -25%
2. nummar -20%
3. nummar -15%

FØROYATELE